# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Realskúlaflokkur í 1955

Her er ein av myndunum frá realskúlaframsýningini, sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Myndin er tikin av realskúlanæmingum á einum gongutúri í Stoffalág í 1955.

Tey trý aftast (sita á steininum) f.v.: Marita Andreassen (Guttesen), Ady Vilhelmsen (Hovgaard) og Kjeld Thomsen

Fremra rað f.v.: Lisbeth L. Samuelsen (Petersen), Randi Djurhuus, Tóra T. Jacobsen (Arge), Elsebeth Sørensen, Sonja Akraberg Hansen (Debes), Jacobina Samuelsen (Setberg), Karen Nonnegaard Pedersen, Anna Egholm (á Steig), Thomas Nygaard (lærari), Hanus Wardum, Gorm Simonsen, Haldane Joensen og Samson Joensen.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024. (Mynd nr. 353)

*Myndaeigari: Inga Simonsen*



†

### Andlát og jarðarferðir

**Svend Ludvig Ryggstein**, vanliga nevndur Luddi, ættaður úr Skopun, búsitandi í Hirshals andaðist 26. januar, 79 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Emmersbæk kirkju fríggjadagin 30. januar klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Ludda kunnu lata eina peningagávu til Heimmissiónsarbeiðið millum útisetar í Danmark. Konta í Norðoya Sparikassa.

**Dagurin**
**28. Januar. Karlamagnus keisari**, deyður í 814. Eini 400 ár eftir deyða sín varð hann eftir uppskoti frá týska keisaranum Fríðriki Barbarossa skírdur halgimenni, men heitið varð ikki viðurkent av pávanum í Róm. Karlamagnus hevur annars verið høgt í metum, ikki minst í Føroyum. Karl er germanskt navn og merkir maður, og Magnus er latínskt og merkir stórur.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

## Minningarorð um Betty Nielsen

Betty fór út til Nólsoyar sum ung genta, hon var arbeiðsgenta hjá Símun lærara og Julianu jarðarmóður. Har var Betty í 3 ár. So bleiv hon gift við Jóanes, tey fingu tvey børn saman - Berhild og Dagny, sum nú sita einsamallar.

Øll í Nólsoy hildu nógv av Betty. Tey vóru eisini góð við hana, hon var so rólig, eg minnist so gott, hvussu góð hon var við meg, tá eg búði har úti sum smágenta og gekk í skúla har. Tað er ein stórur saknur, nú hon er farin.

**B. Hansen**

Sosialurin Sosialurin Sosialurin -har tað hendir

Lesið Sosialin - so eru tit við



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin